


*Nr. 3* *9. februar 2014* *74. árg.*

# Bíbliulesnaður

*Títt orð er ein lykt fyri fóti mínum, eitt ljós á gøtu míni.*
*Sálmur 119, 105.*

Eitt gamalt, danskt orðatak ljóðar: ”At læse uden at forstå er som at pløje uden at så.” Tað er eisini galdandi fyri bíbliulesnað. Munnu tað ikki í dag í mun til fyrr vera færri og færri í landi okkara, sum lesa í Bíbliuni? Ikki ber til at svara spurninginum, men ofta hoyra vit sagt: ”Eg fái onki burtur úr Bíbliuni, eg blaði eitt sindur í henni av og á, men har stendur so nógv undarligt í hasi bókini. Bíbliulesnaður er ikki ein dagligur vani hjá mær.”

Tá ið vit so hoyra um, hvussu fólk í Eysturevropa og aðrastaðni bøna um at fáa eina Bíbliu, so skammast vit. Við eitt flóttafólk varð sagt: ”Um eina viku kann eg skaffa tær eina Bíbliu,” og svarið ljóðaði: ”Hvussu skal eg kunna umvera eina Bíbliu í eina viku?” Hvat siga vit til eitt slíkt svar? Og hvat sigur Gud við fólk okkara, um vit forsøma at nýta bókina, har skrivað stendur: ”Títt orð er ein lykt fyri fóti mínum og eitt ljós á gøtu míni?”

Men um eg nú onki fái burturúr at lesa í tí bókini, hvør hjálp er so í tí? ”At læse uden at forstå er som at pløje uden at så.” Var tað ikki soleiðis, orðatakið ljóðaði? – So má svarið vera, at her er talan um **lýdni**. Trúgv er lýdni. Bøn er ein lýdnishandling. Kirkjugongd og altargongd eru lýdnishandlingar. Tænasta er ein lýdnishandling. Tað sama er bíbliulesnaður. Lýdni er ikki tað sama sum tvingsilsarbeiði. At vera lýðin er av fríum vilja at nýta teir møguleikarnar, sum eg fái fyri at náa málinum, sum eg í samvitsku míni eri sannførdur um er tað einasta rætta.

Far undir regluligan bíbliulesnað! Fylg eini bíbliulesiætlan. Tað er ein spurningur um **lýdni**, og her eru ongar umberingar.
Tann arvurin er gott viðføri at hava við inn í nýggja árið.

*Títt orð er, Gud, várt arvagóðs,*
*tann arv vit bestan fingu,*
*í grøv veit okkum, Gud, tað rós,*
*at leidd av tí vit gingu;*
*tað er vár hjálp í neyð,*
*vár troyst í lív og deyð.*
*O, Gud, ið hvussu fer,*
*lat, meðan verøld er,*
*tað fólks várs arvur vera.*

# *Gud arbeiðir í tær*

*"Tí at tað er Gud, sum virkar í tykkum bæði at vilja og at virka, eftir sínum tokka." Fil. 2,13.*

Eg minnist ein mann, sum hevði ein illkynjaðan svull á aðrari síðuni av andlitinum. Hann líktist einari stórari violettari auberginu. Svullurin hevði vaksið seg so stóran, at hann var næstan líka stórur sum høvdið á manninum. Læknarnir vildu einki gera við svullin. Teir høvdu kannað hann og søgdu, at hann fór at liva longri, um teir einki gjørdu við hann.
Maðurin hevði verið á øllum møguligum grøðingarmøtum, tí hann trúði á guddómliga grøðing. Trúboðarar høvdu lagt hendurnar á hann. Prestar høvdu salvað hann við olju og biðið. Mong menniskju høvdu biðið.
So ein dagin segði presturin við meg: "Eg sá, at hesin útvøksturin, sjálvt um hann enn var har, var farin at minka. Eg sá, at hann krympaði meir og meir. Øll samkoman sá tað. Í einar tríggjar-fýra mánaðir sóu vit, at svullurin gjørdist minni og minni. Tá ið maðurin ein dagin kom í kirkju, sóu vit endiliga, at einki bagdi andliti hansara. Allur svulurin var burtur, og øll húðin á andliti hansara var sum nýggj húð á einum smábarni!"
Presturin spurdi hann, hvat ið var hent. Hann greiddi frá, at hann hevði lisið í Bíbliuni og var komin til Fil. 2,13. Har

stendur: "Tí at tað er Gud, sum virkar í tykkum bæði at vilja og at virka, eftir sínum tokka." Hvønn morgun, tá ið hann hugdi at sær í speglinum, legði hann hondina á útvøksturin og segði: "Gud arbeiðir í hesum svulli. Filippibrævið 2,13 sigur, at tað er Gud, sum virkar í mær, og Hann virkar ikki bara í mínum anda - Hann virkar eisini í kroppi mínum."

Hann endurtók hetta dag eftir dag og viku eftir viku. Og tá ið umleið tríggir mánaðir vóru farnir, sá hann, at útvøksturin smátt um smátt krympaði, og at enda svann hann heilt burtur.

Gud valdi ikki henda mannin burturúr fyri at signa hann. Maðurin sá Orðið, las Orðið og byrjaði at trúgva Orðinum, at tað skuldi virka fyri hann. Og so fekk hann tað, sum Orðið sigur.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ver hugreystur

Tú hevur kanska í mong ár biðið fyri einum ávísum menniskja. Tú heltst, at tú kundi ikki fara úr hesum heimi, fyrr enn tær varð unt at síggja hetta menniskjað fara inn í Guds ríki.

Men broyting er ongin komin enn – hetta menniskjað er líka langt burtur og líka óávirkað, sum tað altíð hevur verið. Og nú troyttast tú. Onkuntíð hugsar tú, at kanska megnar Gud í himlinum ikki at venda einum mannahjarta, tá ið menniskjað sjálvt ikki vil.

Ella at tú hevur ein gerning í Guds ríki, sum tú hevur stríðst fyri av øllum alvi. Óteljandi tímar av frítíð tíni hevur tú lagt tær ógvuliga nær, men onki eydnaðist.

Onkuntíð hevur tað borið eitt sindur av frukt, men kortini ov lítið. Loysir seg so at halda fram? Kanska vóru onnur betur skikkað at gera hetta.

Ella tú hevur stríðst ímóti eini ávísari freisting í lívi tínum. Viðhvørt tókti tær, at tú umsíðir hevði vunnið á freistingini, og so kom hon kortini aftur undan kavi, og tú satst eftir við ósigrinum og skommini.

Er ikki vónleyst at halda á?

Hin vónbrotni, hvør tú ert – í dag troystar Gud troyttu sál tína við einum orði:

”Men verið tit hugreystir og latið ikki hendurnar ørmegnast, tí at verk tykkara skal fáa løn. (2. Krýn. 15,7).

*t.* týddi.

# Rættvísgjørd við Kristusi

Hann hevur lovað at leitt meg eftir tí rætta vegnum: "... fyri navn sítt meg beinir á rætta leið." Sálm. 23,3. Hvussu skuldi Gud, sum er fullkomin lýtaleysur, kunna liva síðu um síðu í himli við menniskjum sum okkum, sum eru langt frá lýtaleys? Tað hevði verið tað sama sum, at universitetið loyvdi næmingum inn, sum einki studentsprógv høvdu.

Íðan, hvat skulu vit so gera meðni? Finna eitt verdugt fólk, sum kann stíga í okkara stað - ella eru vit ævigt glatað! Her er tað, Jesus kemur inn í myndina. Hann er hin góði hirðin, sum gav lív sítt fyri seyðirnar. Her er tað, at hin stóra umbókingin í roknskapinum verður framd!

Á krossinum legði Gud allar syndir okkara á Kristus, og síðani gav hann okkum alla Kristi rættvísi. Hetta var ikki eiti á býti! Tað er bara so stórt! Kæri vinur, bjóða Jesusi inn í títt hjarta og takka honum fyri frelsuna.

*Effie Campbell* umsetti.

# Bíblian

Martensen, biskupur, ið doyði í 1884, segði, tá ið hann var vorðin gamal, at hann hevði varhugan av, at tann dagurin mundi fara at koma í lívi sínum, tá ið hann ikki legði í at lesa nakra aðra bók enn Nýggja Teatamentið.

Hetta minnir okkum á ein gamlan háskúlastjóra, sum á ellisárum segði við ein prest, tá ið hann tosaði um stórar yrkjarar:

Ja! Shakespeare og Goethe og Schiller og ikki at gloyma okkara egnu havi eg fingið nógv burturúr í lívi mínum; men nú er tað vorðið soleiðis, at tað er bara ein bók, mær tørvar at lesa: Bíbliuna!"

*t.* týddi.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 9. febr. | Tekstur: | 4. Mós. 21,4-9 og Jóh. 3,16-17; | bíbliuorð: | Jóh. 13,15 |
| 16. febr. | Tekstur: | 5. Mós. 26,1-11; | bíbliuorð: | 5. Mós.26,11a |
| 23. febr. | Tekstur: | 4. Mós. 27,18 + 22-23 og Jós. 1,1-9; | bíbliuorð: | Jós. 1,5b |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 4* *23. februar 2014* *74. árg.*

# Himmalsku bústaðirnir

*Í faðirs míns húsi eru mangir bústaðir. Jóh. 14,2.*

So menniskjaligt og sannførandi: Eg fari ikki at lumpa tykkum. Tað er soleiðis, sum eg sigi: "Í faðirs míns húsi eru mangir bústaðir."

Hvussu skal tað skiljast? Hús faðirs míns við mongum bústøðum – hvussu kunnu vit ímynda okkum tað? Lat vera við at spyrja soleiðis! Ver skilagóður og ásanna, at tað størsta vanliga ikki kann forklárast! Minst til, at um vit skula siga børnum frá einum sannleika, verður tað altíð gjørt í myndum.

Hesi orðini vórðu søgd kvøldið fyri krossfestingina. Hjá Jesusi var tað umráðandi at gera lærusveinarnar frímóðigar. Tað kvøldið tosaði hann um teir mongu bústaðirnar og legði afturat: „Var tað ikki so, hevði eg sagt tykkum tað."

Tí er tað gott, at fyrstu orðini, sum verða søgd við doypifuntin, eru tey somu, sum verða søgd, tá ið jørð verður kastað á úti í kirkjugarðinum:

"Lovaður veri Gud og faðir várs harra Jesu Krists, sum eftir miklu miskunn síni hevur endurføtt okkum til livandi vónar fyri uppreisn Jesu Krists frá deyðum." Umgird av hesum orðum liva vit í hesum heimi. Í kraft av Jesu tryggu tilsøgn um hús Faðirsins við teimum mongu bústøðunum nýtist ongum at fara illa.

Her og nú – hesi trý orðini hoyra vit ofta nú á døgum, tá ið Guds orð verður boðað. Og tað er gott at fáa undirstrikað. Tað er galdandi her og nú. Men eisini er neyðugt at gera vart við, at vit hava eina fortíð. Hana kunna vit bara tora at standa andlit

til andlits við, tá ið vit við krossins fót hoyra orð Jesu: ”Tað er fullgjørt!” Vit hava eina framtíð, sum vit onki vita um, og sum vit bara tora at hugsa um, tá ið vit standa har, sum steinurin var rullaður frá grøvini. Har og bara har brýtur Guds ljós ígjøgnum myrkur okkara. Har hoyra vit røddina aftan fyri sterku, djørvu orðini: ”Í faðirs míns húsi eru mangir bústaðir. Var tað ikki so, hevði eg sagt tykkum tað.”

Trúgv honum! Fylg honum!

*Eg krossi tínum, Jesus,*
*vil fegin vera hjá,*
*har havi eg tann trygga botn,*
*ið eg kann byggja á.*
*Har er eitt heim í oyðimørk,*
*sum mær er hvíldarstað,*
*tað á míni vandamiklu ferð*
*veitir frelsu neyðardag.*

*Um deyðans kalda myrkur*
*sæst randa nakk og nøv,*
*eg stutt frá krossins skugga har*
*man síggja opna grøv.*
*Og millum okkum krossur Krists*
*so gyltur standa man,*
*hann sum stjørnuljós á myrku leið*
*oss til himin lýsa kann.*

# Tíð

**Kristina Zorba Jenssen**

Gjárdagurin er farin!
Morgindagin kenna vit ikki!
Dagurin í dag er ein gáva!
Njót hann - og brúka hann til fulnar!

Vit liva í einari tíð, har menniskju meir og meir liva undir pressi og strongd. Hjálparfólk á sjúkrahúsum, ellis- og røktarheimum og dagstovnum verða uppsøgd, hóast tað ikki eru færri sjúklingar, gomul fólk ella børn, sum skulu røktast og ansast. Tað eru færri hjálparfólk, sum skulu gera arbeiðið - men tað tykist, sum tíðin ikki røkkur.

Eg veit, hvussu tíðin skorar á, tí eg eri mamma til fimm børn í aldrinum frá níggju til hálvtannað ár. Eg havi lisið síðani 2004 og eri beint nú farin undir seinasta part av mínari útbúgving. Altso, sum eg haldi, at eg havi verið undir tíðarpressi. Men sannleikin er sjálvandi, at Gud hevur skapað døgnið við 24 tímum og vikuna við 7 døgum - og tað er gott fyri menniskjuna at halda hvíludagin.

Eg vildi so fegin dugað at brúkt tíðina rætt, so at eg ikki í heilum livi undir einum pressi. Hjálp mær Gud!

Ímynda tær ein banka, sum hvønn morgun setur 86.400 kr. inn á tína konto. Hvørt kvøld verður hvør króna, sum tú ikki fekst brúkt

gjøgnum dagin, strikað. Hvat hevði tú gjørt? Tikið hvørt oyra út sjálvandi.

Hvør einasti okkara hevur ein tílíkan banka. Navnið á honum er TÍÐ. Hvønn morgun verða 86.400 sekund sett inn á tína konto. So nógv sekund eru í einum døgni. Hvørt kvøld avskrivar hann sum tap alt tað, sum tú ikki fekst sett í eitt gott endamál. Eingi sekund verða flutt til dagin eftir - og yvirtrekk er ikki loyvt.

Hvønn dag letur hann eina nýggja konto upp fyri tær. Hvørt kvøld verða dagsins restir brendar. Um tú letur vera við at brúka dagsins innogn, so er tapið títt.

Virðismet tíðina. Tú skalt liva í løtuni við dagsins innskoti. Ger íløgur við tí á ein hátt, so tú fært besta avkastið í heilsu, eydnu og gleði og til gagns fyri onnur. Tíðin rennur. Fá tað besta burtur úr hvørjum degi!

Um tú skalt skilja virði av EINUM ÁRI, spyr so ein lesandi, sum dumpaði til próvtøkuna.

Um tú skalt skilja virði av EINUM MÁNAÐI, spyr so eina mammu, sum hevur føtt eitt barn ov tíðliga.

Um tú skalt skilja virði av EINARI VIKU, spyr so hann, sum gevur út eitt vikublað.

Um tú skalt skilja virði av EINUM MINUTTI, spyr so ein, sum júst er komin ov seint til tokið.

Um tú skalt skilja virði av EINUM SEKUNDI, spyr so ein, sum júst við neyð og deyð slapp undan einari vanlukku.

Um tú skalt skilja virði av EINUM MILLISEKUNDI, spyr so ein, sum fekk silvurheiðursmerki á olympiaduni.

Virðismet hvørja løtu, sum tú hevur! Og minst til - tíðin bíðar ikki eftir nøkrum!

Gjárdagurin er farin!
Morgindagin kenna vit ikki!
Dagurin í dag er ein gáva!
Njót hann - og brúka hann til fulnar!

*Effie Campbell* umsetti.

---

Jesus er Vegurin. Vegurin førir okkum frameftir móti málinum, eisini sjálvt um vit ikki tora at trúgva tí, av tí at vegurin er langur og snýr sær higar og hagar við brøttum vegbugum. Vegurin førir okkum hagar, ið keldan vellir fram, har Gud er, og hann vætir okkara lívsveg við lívsins vatni.

*e.c.* ums.

# Hvør hevur skyldina

”Gud stýrir ikki heiminum væl,” segði ein starvsfelagi,”

”Hatta er ein skilagóð viðmerking,“ svaraði hin, „hygg inn í urtagarðin hjá grannanum! Tann hurlivasi! Fullur av loki.“

“Iðan, maðurin hevur alla skyldina,” var hin fyrri skjótur at svara.

”Heldur tú tað? Minst til: hvør hevur latið sólina skína, og hvør hevur latið regna? Hetta er granni tín ikki førur fyri at gera.“

”Tvætl, maðurin er ov latur. Hann tímir ikki at arbeiða í urtagarðinum. Hann rørir hann ikki.

”Tú heldur, at eigarin hevur alla skyldina, at urtagarðurin liggur í órøkt?”

Ja, sjálvandi! Hvør annar?”

”Men hvussu er so við tí hurlivasanum, sum er í heiminum? Sig mær, hvussu tað ber til, at allastaðni, sum menniskju liva og arbeiða, verður ruðuleiki, stríð og vesaldómur?”

Maðurin, sum hevði sagt, at Gud stýrdi ikki heiminum væl, mælti ikki ímóti longur. Óivað var nógv lok at lúka burtur í hansara egna hjarta og lívi. Syndin í hjarta okkara er ikki Guds skyld, men vit hava ábyrgdina av henni.

*t.* týddi.

# Sannleikin

Hoyrt í Lindini: Sannleikin er ikki nakað, ið vit hava uppfunnið, men nakað, ið vit uppdaga. Vit kunnu avnokta Guds sannleika, men sannleikin verður verandi. Tað fær avleiðingar, um tú gongur ímóti sannleikanum og skúgvar hann til viks. Tað er tað sama, sum skúgvar tú ferðsluljósini til viks og koyrir út fyri reyðum ljósi.

Jesus segði um seg sjálvan: "Eg eri Vegurin, Sannleikin og Lívið." (Jóh. 14,6) Har hevur tú alt, sum tú hevur brúk fyri. Hevur tú bjóðað Jesusi inn í hjartað, gongur tú á Vegnum, sum gongurt heim til himmals. Jesus er Sannleikin - ikki bara ein av mongum - men tann endaligi, ultimativi, og hann er sjálvt Lívið við stóra L, tað einasta lívið, sum veruliga er vert at liva.

*e.c.* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 23. febr. | Tekstur: | 4. Mós. 27,18 + 22-23 og Jós. 1,1-9; | bíbliuorð: | Jós. 1,5b |
| 2. mars. | Tekstur: | Matt. 6,17-18 og 1. Sám. 16,4-13; | bíbliuorð: | 1. Sám. 16,7c |
| 9. mars. | Tekstur: | Matt. 7, 24-27; | bíbliuorð: | Matt. 7,24 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74